# Must-see: Lítla havfrúgvin

Keypmannahavn: Í 1909 var bryggjarin Carl Jacobsen og hugdi eftir ballettini "Den lille Havfrue", sum er bygd á ævintýrið hjá kenda danska skaldinum H.C. Andersen.

Hann varð sera hugtikin av hesi framførsluni, - so hugtikin, at hann stutt eftir bað myndahøggaran Edvard Eriksen um at skapa eina standmynd av hesi vøkru havfrúnni.

Hugagóður fór Edvard til verka við konu síni, Elinu sum modell. Og soleiðis skapti hann kenda verkið, ið varð avdúkað 23. august í 1913 á Langelinie sum ein gáva til Keypmannahavnar bý.

Hvørt einasta ár verður føðingardagur hennara hildin við ballónum, tónleiki og havfrúgvum sjálvandi. Um tvey ár verður Lítla Havfrúgvin 100 ár.

Herverk er fleiri ferðir framt ímóti standmyndini. Fleiri ferðir hevur hon mist høvdið, fyrstu ferð í 1964, men eisini onnur herverk eru framd ímóti henni.

Í fjør varð standmyndin flutt til Shanghai í Kina sum var vertsbýur fyri Expo 2010. Hon kom aftur á sítt rætta pláss 20. november í fjør.



**HAVFRÚGVIN**

*Hon er kend og hon er elskað av mongum, Lítla Havfrúgvin í Keypmannahavnar. Fyri 25 árum síðani fekk hon ein vælfortjentan koss frá Ova Joensen*

